## HEILSANIR



**Góða Elisabeth**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum. Okur elska teg. Muss og klemm frá **Mostur, gubbanum og Jóhannu**
**PS.** Her eru okur cool



**Góða elskaða Elisabeth**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum. Jesus pápi signi teg. Muss og klemm frá **Hannommuni og Pallabbanum**


Sosialurin
Heilsanir
kr. 30,-

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Týsd. ☐ Mikud. ☐ Hósd. ☐ Fríggjad. ☐ Leygard.

Tekstur: ______________________________

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navnið og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ______________________________

Bústaður: ______________________________

Bygd/býur: ____________________ Tlf.: __________

Sendið lepan, vmynd og gjald til:

Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<


## TILTØK

**Hósdagin 3. november**
***Vesturkirkjan:*** kl. 20.00 Ungdómsgudstænasta, Bergur D. Joensen. TenSing kórið Sound of Glory syngur.
***Sambýlið við Bøgøtu:*** kl. 19.30, Elsa Funding

**Gudstænastur allahalganna sunnudag**
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00 Sverri Steinhólm, talvan gongur fyri Einkjugrunnin
***Nólsoy:*** kl. 12.00 Sonja Klein
***Kaldbak:*** kl. 12.00 Bjarni Bæk
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00 Heri Joensen og Magnus Jørgensen. Talvan gongur fyri Einkjugrunnin
***Kirkjubøar kirkja:*** kl. 12.15, Heri Joensen og Magnus Jørgensen, altarg., Talvan gongur fyri Einkjugrunnin
***Argja kirkja:*** kl. 11.00, Bergur D. Joensen. Talvan gongur fyri Einkjugrunnin
***Gásadalur:*** kl. 11.00, altarg., David Johannesen
***Kollafjørður:*** kl. 12.00, Inga Poulsen Dam
***Hvalvík:*** kl. 12.00, Marjun Bæk. ***Í Vestmanna kirkju gongur talvan fyri Einkjugrunn Føroya.***
***Norðskála:*** kl. 11.40 skriftamál, kl. 12.00 Messa (minningarhald) Emil Olsen
***Eiði:*** kl. 15.00 barnagudstænasta, Emil Olsen og Absalon Matras, kl. 20.00 vesper (aftansangur eftir enskari fyrimynd við Kóri Glyvra kirkju).
***Funningur:*** kl. 17.00 Messa (minningarhald) Emil Olsen. ***Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri Einkjugrunnin.***
***Leirvík:*** kl. 12.00, Uni Næs
***Funningsfjørður:*** kl. 16.00, altarg., Uni Næs. ***Í Fuglafjarðar prestagjaldi gongur talvan fyri Einkjugrunnin.***
***Gøta:*** kl. 12.00, Martin R. Jacobsen – Í Nes prestagjaldi gongur talvan fyri Einkjugrunnin
***Svínoyar kirkja:*** kl. 12.00, Elsa Funding
***Christianskirkjan:*** kl. 20.00 Minningargudstænasta teirra sjólátnu, Hans Eiler Hammer
***Tvøroyri:*** kl. 11.00, altarg., Jónsvein bech
***Fámjin:*** kl. 18.00, altarg., John Myllhamar og Jónsvein Bech
***Vágs kirkja:*** Ólavur Rasmussen.
***Allahalganna konsertin hjá Kirkjukórinum Ljómi verður sunnudagin tann 13. november kl. 18.00.***
***Porkeri:*** kl. 12.00, altarg., Patrick de Neergaard

**Broytt kirkjutíð**
Komandi sunnudag 6. nov., verður farið í kirkju í Sandavági, Miðvági, Sørvági og Bø kl. 12.00.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudag kl. 15.00 Bøn, Mennirnir samlast kl. 19.00. Hósdag kl. 20.00 Heimaforbundið.
Fríggjadag kl. 20.30 Tey ungu í fimleikahøllini. Sunnudagsmøtir kl. 11.00 og 17.00, komm. Gudrun og Carl Lydholm tala. Suðuroyingar syngja.

**Hebron á Argjum**
Mikudagin kl. 20.00 møtast vit í húsbólkum. Einki møti verður í Hebron.
Vegna samfelagsstevnuna í Ítróttarhøllini á Hálsi verður einki møti og eingin sunnudagsskúli í Hebron.
www.hebron.fo

**Frá Ebenezer**
Mikudag Samfelagsstevnan byrjar. Evni: Gud er mentur. Bønamøti kl. 20.00 í Ebenezer.
Hósdagin kl. 10.00 Uppbyggingarmøti í Ebenezer, kl. 16.00 Uppbyggingarmøti í Ebenezer, kl. 20.00 Evangel. møti í Ebenezer.
Fríggjadagin kl. 10.00 Uppbyggingarmøti í Ebenezer, kl. 15.00 Uppbyggingarmøti í Ebenezer, kl. 20.00 Evangel. møti í Ítróttarhøllini á Hálsi. Opið hús kl. 22.30 í Ítróttarhøllini á Hálsi.
Leygardagin kl. 16.00 Uppbyggingarmøti í Ítróttarhøllini á Hálsi, Evangel. møti kl. 20.00 í Ítróttarhøllini á Hálsi. Kl. 22.30 Opið hús í Ítróttarhøllini á Hálsi.
Sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting í Ítróttarhøllini á Hálsi. Barnamøti kl. 12.15 í Ítróttarhøllini á Hálsi. Uppbyggingarmøti kl. 16.00 í Ítróttarhøllini á Hálsi. Evangeliskt møti kl. 19.00 í Ítróttarhøllini á Hálsi.

**Fríkirkjan Oasan**
*Kirkjustræti 4*
Mikukvøldið kl. 20.00 samlast kyknubólkarnir.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti v/ Jóhan P. Johannesen, evni: Jesus.
Sunnudagin kl. 11.00 Gudstænasta v/ Hendrik T. Olsen, kl. 14.00 Sunnudagsskúli.
Mánadagin kl. 16.15-17.00 venur barnakórið, aldur 1. fl. og eldri, kl. 20.00 Felags bønamøti í Oasuni. Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Meinigheitshúsið**
Mikukvøldið kl. 19.00 Meinigheitskórið venur.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsgudstænasta við altarg. í Vesturkirkjuni v/ Bergur D. Joensen.
Leygardagin kl. 16.30 Bønaløta – kvinnur.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ John Petersen, Hildur Davidsen syngur.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20.00 Møti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli í Býlingshúsinum á Norðasta Horni.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti í Missiónshúsinum v/ Øssur Kjølbro.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 16.00 Bøn fyri samkomuni, kl. 19.00 Chil.
Í morgin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Fríðtór Debes, kl. 11.50 Sunnudagsskúlin.
Mánadagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 20.00 Felags bønafundur í Oasuni.
www.filadelfia.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Hósdagin kl. 16.00 Eldrahugni.
Fríggjakvøldið kl. 19.30 MiniSalt.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og Morgunmøti við Sunnudagsskúla, Theodor Petersen talar, kl. 18.00 Møti við Birgit og Niclas Thomsen.
Mánakvøldið kl. 20.00 Felags bønamøti í Oasuni.
www.gospel.fo

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Onki møti hesa vikuna vegna samfelagsmøtir í Ebenezer.
www.livdin.fo

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Hósdagin 3. november verður Taizé-kvøld (Bønarstund v/ sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Hámessa í Mariukirkjuni. Aftaná verður ein kaffimuður í Meinigheitshølinum. Sunnudagsskúli kl. 14.00. www.katolsk.fo

### Brúdleyp

Leygardagin 12. november kl. 14.00 giftast í Oyndarfjarðar kirkju Sølvá Árnadóttir úr Oyndarfirði og Jóhan Vest av Sandi. Vælkomst verður kl. 21.00 á Hotel Føroyum.

Leygardagin 26. november giftast Molly Elisa Torbjørnsdóttir Jacobsen og Sjúrður Højgaard. Vígslan verður í Skopunar kirkju kl. 15.00. Veitslan verður hildin í Samljóð kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 361805, 361119, 582058, ella 447215 áðrenn 19. november.

Leygardagin 26. november kl. 15.00 giftast í Glyvra kirkju, Doretha Hansen, Runavík og Karstin Joensen, Klaksvík. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 448212, 456428 ella 220606 áðrenn 18. november.

### Silvurbrúdleyp

Mánadagin 7. november hava Marjun og Virgar Hentze á Eiði, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 19. november í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í silvurbrúdleyp, verða vinarliga biðin um at ringja á tlf. 423065 ella 224382 í seinasta lagi 12. november.

7. november hava Jóna og Brynjálvur Festirstein, Klaksvík, verið gift í 25 ár. Tey hava opið hús í Skálanum leygardagin 12. november frá kl. 14.00.

Leygardagin 10. desember kunnu hjúnini Malan og Kristian Hansen í Nólsoy halda silvurbrúdleyp. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 327112 ella 580273 áðrenn 1. desember. Byrjað verður á Flakavirkinum við døgurða kl. 19.30.

### Gullbrúdleyp

Tann 19. november hava Marna og Jákup Joensen á Eiði gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Ítróttarhøllini á Eiði sama dag kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið við at koma í gullbrúdleyp, kunnu siga frá á tlf. 423078, 723078 ella 210578 ella á teldupost **gullbr@yahoo.dk** innan 10. november.

Leygardagin 3. desember hava Jolina og Gabriel Hansen, Nólsoy, gullbrúdleyp. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 327011 ella 327150 innan 18. november og byrjað verður á Flakavirkinum við døgurða kl. 19.00.

Tann 4. desember hava Gertrud og Martin Gunnarstein í Vági gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin á gistingarhúsinum í Øravík leygardagin tann 3. desember. Tey, ið vilja halda dagin saman við gullbrúðarparinum, kunnu siga frá á tlf. 373358 ella 373980 innan 20. november.

**75 ár**
Leygardagin 5. november fyllir Thorborg Haraldsen, Miðvágur 75 ár.

**Prógv**
Kirstin Eliasen, Toftir, hevur á Københavns Universitet tann 18. oktober lokið prógv sum cand.scient. í lívfrøði.